# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

**Royndarkoyring á Bilradio**

Í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 17.10 verður Mitsubishi iMiEV royndarkoyrdur.

# Reinur og ljóðleysur framtíðarbilur




*Mánadagin vóru umboð fyri SEV og Ivan Johansen Bilar á gamla SEV-verkinum í Gundadali og royndarkoyrdu bilin. Uttast til vinstru er Johan Mortensen frá felagnum Baldursbrá, sum er ein av stigtakarunum til at fáa bilin higar til lands*

**Týsdagin royndarkoyrdu vit elbilin Mitsubishi iMiEV, sum var komin higar í sambandi við samstarvsavtaluna, sum var undir skrivað millum elfelagið SEV og Dong Energy. Bilurin er ljóðleysur og CO2 útlátið er 0 gr/km**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Ongin ivi er um, at í bilaídnaðinum eru stórar broytingar á veg. Tað er bert ein spurningur um tíð, til elbilar koma at avloysa teir vanligu bensin- og dieseldrivnu bilarnar, sum vit kenna í dag.

Mitubishi iMiEV er ivaleyst tað mest realistiska boðið upp á smáar elbilar, og tann mest framkomni av teimum vit higartil hava sæð. Konseptið við Mitsubishi iMiEV er ein eldrivin persónbilur við plássi til fýra vaksin, sum als ikki dálkar og er kvikur og lættur at handara í ferðsluni. Sum tað sæst á myndunum, eru hjólini so langt frá hvørjum øðrum sum til ber, og langa aksilfrástøðan ger, at sera gott pláss er í kabinuni.

El-motorurin hevur 64 hk, og hægsta snúningsmomentið er upp á 180 Nm, sum ger bilin eins kvikan og ein miðalklassabil við bensinmotori. Bilurin verður drivin av bakhjólunum, og toppferðin er 140 km/t. Umframt at koyra í D (drive), ber til at seta girstongina á E (eco), tá hann koyrir mest økonomiskt, ella B, tá tann løðir í battaríini, meðan hann koyrir.

Battaríini, sum viga 200 kg, eru millum gólvið í bilinum og sjálvan botnin. Hetta er við til at halda tyngdipunktinum lágt niðri til frama fyri tryggar og stabilar koyrieginleikar. Dekkini eru eisini sergjørd við sera lágari rullumótstøðu. Sum aðrir vanligir bilar hevur hann ABS og airbag. Bilurin viger tilsamans 1.080 kg.

Mitsubishi iMiEV hevur lithium-ion battaríir, sum eru sett saman av 22 modulum til ein samlaðan battarípakka. Sambært Mitsubishi eigur bilurin at kunna koyra 144 km upp á eina fulla løðing, men tað valdast sjálvandi hvussu koyrt verður, og hvar bilurin koyrir. Battaríini hava 10 ára garanti ella 150.000 km.

Mitsubishi iMiEV er fyrireikaður til ymsikar mátar at løða bilin uppá. Løðing við 220V spenningi, sum verður nýttur í vanliga húsholdninginum, 380V er ein møguleiki og so er eitt stikk til skjóta løðing (quick charge), sum helst verður ein partur av t.d. infrastrukturinum í framtíðini.

Bilurin var royndarkoyrður hjá Ivan Johansen Bilum við Hoyvíksvegin, sum umboða Mitsubishi í Føroyum.




*Sum tað sæst á hesi myndini eru battaríini í botninum á bilinum og el-motorurin aftan*

**Mitsubishi iMiEV**

| | |
|---|---|
| Motorurin | Elmotor (47 KW) 64 hk |
| Snúningsmoment | 180 Nm |
| CO2 útlát | 0 gr/km |
| Toppferð | 130 km/t |
| Koyrir upp á ein løðing | 144 km |
| Battarí | Lithium-ion (330V / 16kwt) |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 339,5 cm |
| Breidd | 147,5 cm |
| Hædd | 160,0 cm |
| Vekt | 1.080 kg |
| Løðitíð 220V | 6 tímar |
| Løðitíð (Quick charge) | 30 min |

**Um bilin**

- 150.000 km, 2.000 løðingar
- Ein løðing 6 tímar, íalt 18 kWh
- SEV prísur 1,51 kr/kWh
- 27 kr fyri hvørja løðing
- iMiEV, 140 km/løðing, 19 oyru/km
- SEV 2007 miðal – 379g CO2/kWh
- iMiEV, 8 km/kWh – 47,4g CO2/km

*Kelda: SEV*